# Álit

# í

**ungdómstingsmáli nr. 9/2012: Uppskot til samtyktar um fleiri undirvísingartímar í ítrótti**

Miðvágs-Sandavágs skúla hevur lagt málið fram hin 6. februar 2012, og eftir 1. viðgerð 6. februar 2012 er tað beint í Mentanarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 6. februar 2012.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Føroya lærarafelag.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Vigdis Mellemgaard, Benjamin Rajani, Virgar Johansen, Egi Djurhuus, Rani Johansen, Anna Nolsøe Joensen, Sascha Due Niclassen, Svanna Olsen og Gutti Christiansen) heldur ikki, at tað er rætt at hækka talið av undirvísingartímum í ítrótti. Tað hevði tikið tímar frá øðrum fakum. Meirilutin heldur, at um ungdómar ynskja at íðka meiri ítrótt, so stendur teimum í boði aftan á skúlatíð at taka av teim nógvu tilboðunum, sum finnast.

Meirilutin tekur tí ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja tað.

**Minnilutin** (Tóri Nielsen og Mike Gaardlykke) vísir á, at nútíðar ungdómur rørir seg alt ov lítið. Ungdómurin er í alt ov ringa kondition. Hetta fer at hava óhepnar avleiðingar fyri heilsuna seinni í lívinum.

Minnilutin vísir á, at kanningar vísa, at ungdómur, sum íðkar ítrótt, hevur munandi betri innlæring. So at hækka talið av undirvísingartímum í ítrótti fer ikki bert at hava góðar avleiðingar fyri heilsuna, men eisini betra um innlæringina.

Minnilutin tekur tí undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja tað.

**Mentanarnevndin, 7. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Vigdis Mellemgaard | Benjamin Rajani | Virgar Johansen |
| Egi Djurhuus | Rani Johansen | Anna Nolsøe Joensen |
| Tóri Nielsen | Sascha Due Niclassen | Mike Gaardlykke |
| | Svanna Olsen | Gutti Christiansen |